## Flogfar rendi á fugl




Eitt rutuflogfar hjá norska flogfelagnum Widerøe noyddist at venda aftur fyrrapartin í gjár, eftir at tað hevði stoytt saman við ein fugl. Nordlys skrivar, at flogfarið var júst farið á flog av flogvøllinum í Bodø, tá tað stoytti saman við ein fugl. Flogskiparin gjørdi av at venda aftur, og løtu seinni setti flogfarið seg í øllum góðum. Flúgvileiðarin í Bodø sigur, at eingin vandi var á ferð, men flogfarið skal kannast, áðrenn tað sleppur aftur á flog.

## Vænta lítlan ís

Íslendingar vænta ikki nógvan havís fram við landi í Grønlandsfjørðinum í vetur. Ta seinastu tíðina hevur hann verið vestan í ættini, og tað hevur gjørt, at nakað av ísi er komin undan Eysturgrønlandi og eystur við Vestfirðum. Men royndirnar vísa, at ísurin hevur verið minkandi tey seinastu umleið 30 árini orsakað av, at sjógvurin er vorðin lýggjari, skrivar Morgunblaðið. Tað ger millum annað, at ísurin bráðnar skjótari enn fyrr.

# Heldur tryggari karmar

**- Fiskiflotin stendur yvirfyri stórum avbjóðingum við hækkandi rentu, hækkandi oljuprísum, lækkandi dollarvirði – og at enda vantandi arbeiðsmegi. Skipini tjena ikki »yvirnormalan profitt«, og tí eiga myndugleikarnir ikki at leggja meira skatt á flotan. Vit eiga heldur at geva vinnuni betri og tryggari karmar at virka undir, sigur Bjarni Arnason, sum helst kennir gongdina í føroyska fiskiskipaflotanum betur enn tey flestu**

FISKIFLOTIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bjarni Arnason, ið starvast hjá grannskoðarafyritøkuni Rasmussen & Weihe, hevur seinastu árini greinað roknskapirnar hjá føroyska fiskiskipaflotanum, sum er yvir 100 tons og er fevndur av lógini um vinnuligan fiskiskap.

Greiningin byggir á almennar roknskapir og yvir tøl, sum Bjarni hevur útvegað sær í aðrar mátar yvir gongdina hjá flotanum. Hann má tí metast at vera ein av teimum, sum rættiliga kann sigast at hava sett seg inn í gongdina hjá okkara fiskiskipaflota seinastu árini.

### Misjøvn gongd

Bjarni Arnason var ein teirra, sum hevði framløgu á fiskivinnuráðstevnuni í Klaksvík herfyri.

- Vit hava soleiðis gjørt kanningar av at kalla øllum fiskiskipaflotanum, segði hann.

Á hvørjum heysti hevur grannskoðarafelagið skipað fyri framløgu á skrivstovu felagsins, har viðskifafólk hjá felagnum eru boðin við.

Sosialurin hevur soleiðis eisini við stórum áhuga luttikið á fleiri av hesum framløgum, ið Rasmussen & Weihe hava skipað fyri.

Á ráðstevnuni í Klaksvík segði Bjarni, at tað eru tveir skipabólkar – pelagiski flotin og verksmiðjuflotin – sum kanska eru førir fyri at endurnýggja seg við teirri gongd, sum hevur verið og er í løtuni. Hesir hava havt eina fína forrenting av eginognini, meðan hon hevur verið negativ hjá øðrum skipabólkum.

- Flestu skipabólkar hava tískil ikki fíggjarliga orku til endurnýggjan, men hava so dánt pening til viðlíkahald og at seta skipini í tann stand, sum sjófólkið í dag krevur av sínum arbeiðsplássi.

Hann ásannaði, at tað eru skipabólkar, sum hava tað trupult, og har lønsemið einki er at reypa av.

- Gongdin røkkur ikki til, at feløgini hava nóg stóra fíggjarliga orku til at dagføra flotan, sum innan ávísar skipabólkar longu hevur nógv ár á baki.

Bjarni vísti eisini á, at ársverkini í flotanum sambært uppgerðini hjá honum fækka í tali.

### Avlop til hall

- Vit síggja, at samfelagið er ógvuliga væl koyrandi í løtuni, og tað merkir, at torført er at útvega fólk til fiskivinnuna, bæði á sjógvi og landi. Neyðugt verður tí at hyggja eftir, hvar og hvussu man kann fáa arbeiðsmegi at fylla tey plássini, har tørvurin er.

Hann segði, at árið 2001 var eitt serliga gott ár hjá fiskiskipaflotanum sum heild – og 2002 var eisini eitt rímiliga gott ár.

- Men síðan hevur gongdin verið heldur vánalig hjá fleiri skipabólkum.





*Bjarni Arnason, sum situr fremstur vinstrumegin á myndini, má metast at vera ein av teimum, sum rættiliga kann sigast at hava sett seg inn í gongdina hjá okkara fiskiskipaflota seinastu árini. Hann hevur nevniliga gjørt regluligar greiningar yvir meginpartin av fiskiflotanum yvir 100 tons, sum er fevndur av lógini um vinnuligan fiskiskap*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*